

**Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur**
*Býraðslimur*

# Fíggjarnevndin raðfesti vegir og bygningar hægri enn íbúðir til fólk við menningartarni!

Bæði Klaksvíkar Kommuna og landsstýriskvinnan í almannamálum vilja hava, at íbúðir verða bygdar til fólk við menningatarni. Nú er bert upp til løgtingið at gera av, um tey hava viljan at játta neyðuga peningin.

Landsstýriskvinnan í almannamálum ætlaði, at nú skuldi tað stóra takið takast at byggja íbúðir til menningastarnað, bæði í Eysturoynni og í Norðoyggjum. Hetta sá eisini út til at skula eydnast í fyrsta umfarið, tí peningur til endamálið var avsettur á fíggjarlógini fyri 2011.

Tað vóru nógv, sum gleddist saman við landsstýriskvinnuni, at loksins fór verkætlanin at byggja íbúðir til menningatarnað í Eysturoynni og Klaksvík av bakkastokki.

Ja hettar var eitt veruligt frambrot innan økid. Nú kundu hesi í samfelagnum, sum so mangan hava verid fyri vanbýti gledast og síggja ljós fyri framman.

### Fíggjarnevndin raðfesti øðrvísi

Men tað gingu ikki nógvir dagar, so gjørdi fíggjarnevndin sína ávirkan galdandi og valdi at raðfesta øðrvísi. Fíggjarnevndin raðfesti viðlíkahald av vegum og bjálving av almennum bygningum hægri enn íbúðir til menningartarnað.

Eg skilji slettis ikki, at landins mynduleikar vilja standa model til, at okkara veiku í samfelagnum skulu standa so aftarlaga í raðfestingini. Møgluliga skulu hesi nú aftur bíða í fleiri ár eftir at fáa eitt meira virðiligt og betri lív. Herviðer ikki sagt, at tey ikki eisini hava tað gott heima. Men tá teirra foreldur eru vorðin gomul, hava tey ikki somu orku at taka sær av sínum kæru við menningatarni.

Eg kann ikki ímynda mær, at okkara fólkavaldu vilja hava sitandi á sær, at teir ikki í hesum valskeiðinum megnaðu at seta skjøtul á byggingina av íbúðum til fólk við menningatarni. Men velja heldur at raðfesta viðlíkahald av vegum og bjálving av almennum bygningum hægri.

Eitt er púra vist, tað snýr seg um raðfesting og vilja. Og við sterkum vilja koma vit langt. Klaksvíkar kommuna skal ikki verða nøkur forðing fyri at bygt verður í kommununi, men tvørturímóti er sinnað at gera tað, sum liggur í okkara makt, at tað skal eydnast . Vit eru til reiðar at seta økið av til bygging av íbúðum til fólk við menningatarni.

Vit kunnu ikki annað enn vænta og vóna, at okkara landspolitikarar, sum vit í norðurøkinum stóðu saman um at fáa á løgting, nú fara at standa saman um, at íbúðir verða bygdar í norðurøkinum. Tí standa vit saman, koma vit ótrúliga langt.



**Frank Davidsen**
*Sørvágur*

# Ger tína skyldu og krev tín rætt

Hesi sigandi orðini runnu mær í huga, tá ein av slóðbrótarnum innan pelagisku fiskivinnuna varð biðin um at gera viðmerkingar í sambandi við býtið av makrelkvotuni.

Í áratíggjir hevur hann saman við øðrum góðum monnum við einum ótrúligum áræði og treiskni, hóat tað mangan sá svart út, verið viðvirkandi til at vunnið samfelagnum eina søguliga kvotu, sum við sínamillum avtalum við onnur lond hevur givið føroyska samfelagnum risa inntøkur.

Hyggja vit til dømis bara at týdninginum, sum hesin býtisfiskur hevur havt at siga fyri trolararnar í Barentshavinum, so hava hesir ígjøgnum hesi mongu árini fiskað fyri tíggjutals, ikki milliónir, men milliardir krónur. Og Havsbrún hevði verið illa statt, um hesir undangongumenn innan pelagisku vinnuna góvust á hondum.

Mótvegis hesum monnum vóru tað teir, sum fingu ókeypis kvotu burtur úr vinar- og kenningarpolitikki fyri síðani at selja kvotuna fyri milliónа upphæddir.

Teir menn, sum við hegni og áræði hava ogna sær eitt av heimsins mest framkomnu veiðitólum, hava so sanniliga gjørt sína skyldu, og tí eiga teir at fáa tann lut í makrelkvotuni, sum tryggjar teimun tær fíggjarligu umstøðurnar ið krevjast, fyri at teirra veiðitól kann halda áfram í tí vinnugrein, sum bæði tess manningar og tað føroyska samfelagið hevur havt ein so ómetaligan stóran ágóða av.

Sum tað so mangan er sagt, so hevur makrelur eisini stert, so óansæð um kvotan á pappírinum verður sett til 150.000 tons, so er altíð ringt at spáa fram í tíðina.

Vit skulu eisini minnast til, at russar longu hava fingið 26.000 tons á sína konto, áðrenn makrelkvotan er ásett.

Hvat nú um kanska bara helvtin av 150.000 tonsun er veidd í okkara sjóøki tá fiskiárið er farið at halla, bara tí at kvotan verður lutað út til meginpartin av tí føroyska fiskiflotanum, harav stórur partur ikki hevur neyðugu tólini og orkuna, og russar?

Hvat er støðan hjá pelagiska flotanum tá? Skulu hesir menn tá seta sítt álit á at veiða botnfisk á landleiðini, ella hvat?

Tað er púra greitt fyri mær, at pelagiski flotin fyrst og fremst eigur at hava rættindi fram um onnur skip at veiða ta nøgd, sum tryggjar henda flota fíggjarliga, áðrenn aðrir skipabólkar fáa lut í hesi veiðu.



**Heini Holm**
*Kvívík*

# Nýggjur kommunu-*deformur*?!

**Í samband við at nýggjur kommunureformur nú er koyrdur í Tingið til viðgerðar, skal eg bert koma við hesari viðmerkingini:**

Torført er at fáa eyga á teir fyrimunir tær komandi 9 kommunurnar fáa av einari samanlegging. Eg skal bara svara fyri okkum í Kvívík at akkurát ONGIN fyrimunur og ongin betring av service til borgarnar verður av eini samanlegging við Vestmanna! Antin leggja Kvívík og Vestmanna saman við Vágum og harvið blíva ein kommuna við sløkum 5.000 borgarum og einari fíggjarætlan upp á kanska 150 mill. ella kunnu vit ákkurát tað sama, framhaldandi verða hesi 600 tandrini sum nú er. Vit klára okkum fínt sum nú er fíggjarliga, við einari inntøku uppá 18-19 mill, her raksturin av kommununi liggur um tær 12 mill. T.v.s. at 6 mill eru til avdrøg og íløgur.

Vestmenningar skulu nokk klára seg, tað hava teir gjørt í yvir stórthundrað ár. Kommunuskuld er komandi og farandi.

Tummas Arabo hevði eina sera viðkomandi grein um at broytingar skulu koma frá fólkinum. Og mær vitandi ganga fólk ikki runt landið og *krevja* samanleggingar. Tað ið Landstýrið hevur gjørt er, at man setur ein "Serfrøðingabólk" at snikka eitt uppskot til, ið síðani skal smoygjast oman yvir borgarnar! Ivaleyst dugnalig fólk men eg ivist í samansetingini. Hvørjir bólkar eru umboðaðir?

Man skuldi jú fara frá smærri kommunum til størri eindir, men sambart úrslitinum frá arbeiðsbólkinum ger man 9 kommunur. Tv.s. at fyrst staðfestir man at t.d. Vágur 1400, Tvøroyri 1800, Fuglafjørður 1700, eru ov lítlar kommunur og skulu leggja saman við øðrum kommunum. Men so ger man tann brølaran at mæla til at leggja Kvívík – Vestmanna saman 1700 fólk, man leggur Vágar, 2800 fólk í eina kommunu, Sunda kommuna 2200 fólk, og Sandoyggin 1400 fólk í eina kommunu. Altso, man stóvnar nýggjar kommunur ið vera sera veikar fíggjarliga og fólkatalsliga, og søkka sum steinurin fíggjarliga, tá skúli og almannaverk verður smoygt omanyvir tær, útjavning av skatti ella ei, men sama áliti sigur at kommunur sum í dag hava ca 1600 fólk eru ov veikar ???!!!

Síggi eisini á einum portali at Annika Olsen úttalar seg "persónligt", tað er sera óprofessionelt. Vónandi verður kommunutalið ikki avgjørt eftir høvdinun á einum tilvildarligum landsstýrisfólki.

Eg síggi fyri mær m.a Fuglafjørð, Eiði, Kvívik, Sørvág og Hvalba, sum tær bygdirnar ið hava mest at missa um tað verða 9 kommunur.

Mítt tilmæli til flokkarnar á tingi skal verða at tað verða max. 5 kommunur í Føroyum. Takið nú eina manniliga støðu, og fremjið ein reform ið munar!

Tað ið fyriliggur nú er eitt neyðaregg, ein millumloysn, har helvtin av føroyingum fara at búgva í veikum kommunum, ímeðan hin helvtin fer at merkja fyrimunirnar at búgva í kommunum við einari sterkari fyrisiting, og betri møguleikum hjá politikkarum at føra ein ekspansivan politikk á øllum økjum; hyggið bara eftir Havnini!